## Taka koyrikortið umaftur

Um vikuskiftið tók løgreglan í Eysturoy tveir bilførarar fyri at koyra ov skjótt, Millum Fjarða. Og teir koyrdu alt ov skjótt, tí annar koyrdi 119 kilometrar um tíman og hin koyrdi 115, har tað annars bara er loyvi at koyra 80. Teir báðir skulu nú upp til koyriroynd av nýggjum. Standa teir ikki royndina, missa teir koyrikortið. Standa teir royndina, er ikki sloppið fyri tað, tí teir fáa samstundis ein treytaðan dóm í trý ár. Tað merkir, at gera teir nakað revsivert í trý ár, sum annars hevði ført við sær, at teir høvdu mist kortið, so missa teir tað upp á standandi fót, sigur løgreglan.



## Herverk á apotekinum

Sunnunáttina var herverk við apotekið í Runavík. Har høvdu ótangar brotið einar 10 av útilyktunum uttanfyri apotekið. Løgreglan kom á staðið, men hevur ongan undir illgruna. Annars verða tveir mans skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring. Tað hendi eftir eitt óhapp við Shell støðina í Gøtudali, har ein bilur rendi á ein lyktapela. Tveir mans vóru í bilinum, men tað hevur ikki eydnast at staðfesta, hvør koyrdi. Tí er blóðroynd tikin av báðum monnum og fyribils verða teir nú eisini báðir skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

# Bilbukt fáast við havdálking

**Í morgin byrjar tveir daga ráðstevna um »Burturkast frá skipum og móttøkuskipanir í havnum«. Ráðstevnan, ið er stuðlað av Norðurlendska ráðharraráðnum, verður hildin á Hotel Føroyum**



*Stórur partur av ruskinum, ið rekist í fjørunum kring landið stavar frá burturkasti, ið tveitt verður fyri borð av skipum. Men Roar Olsen av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni heldur, at ein hugburðsbroyting er á veg, og at størri og størri partur at burturkastinum verður tikin við til lands*

*Mynd: Heilsufrøðiliga Starvsstovan*

DÁLKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Talan er um eina norðurlendska ráðstevnu og roknað verður við luttakarum úr øllum Norðanlondum. Stevnan fer tí fram á norðurlendskum máli.

Tað er Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum samskipar tiltakið, og miðað verður eftir at:

- kunna um vitan og nýligar frágreiðingar um burturkast frá skipum,
- lýsa og taka saman um reglur og royndir við handfaring av burturkasti umborð á skipum og við móttøkuskipanum í havnum í Norðanlondum,
- staðfesta, um trot er á at endurskoða galdandi reglur, umsiting av reglunum og um tørvur er á kunningarátøkum.

Í tí sambandi verða millum annað hesar norðurlendsku verkætlanirnar lýstar:

- Håndtering av avfall ombord på fiskebåter og mindre fartøyer, TemaNord 2006:502, ið vísir tøkni og mannagongdir, sum kunnu brúkast umborð á smærri skipum til viðgerð og goymslu av burturkasti. Frágreiðingin er eisini á føroyskum, men er enn ikki prentað.
- Fast avfall från fiskefartyg, TemaNord 2005:579, um reglur í sambandi við viðgerð av burturkasti umborð á skipum.
- Ein leiðbeining til havnir í sambandi við móttøkuskipanir til burturkast og annað.

### Hugburðsbroyting

Tað er Roar Olsen frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum samskipar ráðstevnuna. HS hevur nú í ena tíð framt eina lýsingarherferð við herrópinum »Koyr ikki á vestfallið«. Við hesum hevur verið roynt at ávirka skiparar og manningar at taka ruskið við aftur til lands, heldur enn at tveita fyri borð.

- Norðurlond hava í eina tíð samstarvað á økinum, tí dálkingin steðgar ikki við landamørk, serliga ikki á sjónum. Eisini eru gjørdar altjóða avtalur á økinum, sigur Roar Olsen.

Hann sigur, at tankin um at verja umhvørvið ikki er heilt nýggjur.

- Í Føroyum byrjaðu vit so smátt at hugsa um umhvørvið seinast í 70-unum og fyrst í 80-unum í sambandi við, at IRF varð sett á stovn. Men so tóktist, sum minkaði áhugin fyri hesum, og ikki fyrr enn nú er verulig gongd komin á aftur við lógarsmíði á økinum, sigur Roar Olsen.

Men hesi seinastu árini tykist kortini, sum ein hugburðsbroyting er farin fram á økinum.

- Mín kensla er, at tað er eitt sindur ymiskt, hvussu raskir menn eru at taka burturkastið við til lands. Summastaðni kemur nakað upp á land, aðrastaðni kemur alt. Fleiri skiparar siga, at har teir fyrr tveittu alt fyri borð, verður nú hvørt nikk og prikk tikið við til lands aftur, so tað er nógv sum bendir á, at talan í nógvum førum er um eina hugburðsbroyting, tá tað kemur til burturkast umborð á skipum, sigur Roar Olsen.

### Stór ráðstevna

Norðurlendska samstarvið hevur nú ført til, at fyrsta ráðstevnan av hesum slagi verður fyriskipað, og tað er Norðurlendska ráðharraráðið, ið er stóri fíggjarligi viðspælarin, men Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum samskipar tiltakið.

Ráðstevnan verður hildin á Hotel Føroyum í morgin og ovurmorgin, og hevur luttøku úr øllum Norðurlondum.

- Talan er fyri tað nógva um luttøku frá umhvørvismyndugleikum, teknisku deildum hjá kommunum og havnafútum. Men eisini frá fólki og stovnum, sum hava við hesi viðurskifti at gera. Luttakarar koma úr øllum Norðurlondum, og teir verða millum 70 og 80 í tali, sigur Roar Olsen.

Hann sigur víðari, at hendan ráðstevnan fer at veita teimum svar upp á nógvar spurningar, sum til dømis hvussu ymsu londini skipa viðurskiftini við burturkasti umborð á skipum. Eisini roknar hann við, at betri greiði fæst á, hvussu støðan er her heima hjá okkum sjálvum.

- Tað eru bæði skipaeftirlit og veiðieftirlit við skipunum, og tað gerst meiri og meiri vanligt, at skiparar kunnu vísa kvittanir fyri, at teir hava latið burturkastið upp á land. Og hetta er, hóast eingin bót verður givin fyri ikki at kunna framvísa kvittan. Og tað er flott, sigur Roar Olsen.

Tá ráðstevnan er av, verður ein frágreiðing skrivað til Norðurlandaráðið um støðuna við burturkasti umborð á skipum.

## Bilar í hópatali missa pláturnar

Løgreglan kring landið er nú farið runt við saksinum og er farin at klippa nummarpláturnar av bilum, har eigarin ikki hevur goldið vegskatt. Talan er um vegskatt fyri seinna hálvár í ár. Akstovan hevur sent løgregluni kring landið ein lista við 483 nøvnum á yvir bileigarar, sum ikki enn hava goldið vegskattin fyri seinna hálvár í ár og seinastu dagarnar hevur løgreglan havt saksin liggjandi í bilinum.

Eisini í Eysturoy missa fleiri bilar pláturnar. Løgreglan sigur, at hon hevur ein lista við 130 bilum á, sum eiga at missa pláturnar og í gjárkvøldið mistu eini 12-15 bilar pláturnar. Annars verða pláturnar tiknar, so hvørt, løgreglan kemur fram á bilarnar.

Og er løgreglan komin á gátt er bara ein møguleiki at sleppa undan at missa pláturnar og tað er at hava eina kvittan fyri vegskattin at vísa fram. Tað er dýrt at missa pláturnar, tí umframt vegskattin, kostar tað nakrar hundrað krónur at fáa nýggjar plátur.